# Ein sólskinssøga – AFS visiónin veruleiki



Frá vinstru aftast: Susanne, Christian, Regula, Bruno, Palli. Frá vinstru fremst: Franzi, Walter, Steffi, Lilja, Mahmooda, Elisabeth, Sólja við hundinum Lilo. Fremst Lý. Vinstrumegin Steffi og familjan Luzern í Sveis

## - stór altjóða familja savnast í Nicolai Mohrsgøtu á Ólavsøku

Familjan hjá Elisabeth Holm av Tvøroyri og Palla Mortensen úr Vági savnast á fyrsta sinni nú um ólavsøkudagarnar í heiminum hjá familjuni í Tórshavn. 5 AFS-Altjóða systrar møtast fyri fyrstu ferð. Familjan fer at njóta Ólavsøkuna saman og saman við túsundum av føroyingum frá nær og fjar, ið øll vilja heim til Ólavsøku. Ólavsøkan er nakað serstakt í ár fyri Elisabeth og Palla. Eldsta dóttir teirra, 16 ára gamla Lilja, er júst heimkomin úr Argentina eftir at hava verið skiftisstudentur gjøgnum AFS í eitt ár. Mahmooda, AFS-dótturin úr Chicago kom í gjárkvøldi og Steffi, AFS-dótturin úr Sveis, er eisini heimkomin saman við foreldrum, systkjum og makum teirra. Her er søgan um eina kjarnufamilju, ið nýtti gylta møguleikan AFS bjóðar í meira enn 60 londum kring heimin.

### Hjartarúm er í Gulu húsini í Nicolai Mohrs Gøtu 5.

Familjan Holm/Mortensen eiga 3 børn, døturnar Lilju, Sólju,Lý og ikki at gloyma hundin Lilo. Elisabeth hevur arbeitt á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølim síðani 1992, men fer nú í nýtt starv og Palli er leiðari á Hjálpartólamiðstøðini. Tey hava síðani mitt í 90unum økt munandi um famlju sína, ið nú fevnir so vítt sum til USA, Sveis og Argentina. Mahmooda úr Chicago bleiv ein partur av familjuni árið 1996 - 97 . Forfedrarnir hjá Mahmoodu eru pakistanar, ið hava búðsett seg í USA, og sum flestu pakistanar eru familjan og Mahmooda muslimar. Mahmooda gekk eitt ár á Føroya Studentaskúla í Hoydølum. Steffi úr Sveis kom sum AFS-ari til Føroyar og inn í familjuna Holm/Mortensen í 2003- 2004, hon fór eisini á Føroya Studentaskúla í Hoydølum Tá Mahmooda var í Føroyum átti familjan 2 døtur, Lilju og Sólju, meðan tá Steffi kom var Lý komin aftrat. Tað er fyrstu ferð at allar døturnar eru saman samstundis. Árið 2006-2007 hevur familjan verði spjadd víða um, soleiðis at mesta beinleiðis sambandið hevur verið gjøgnum alnótina.

Hvussu hevur tað verið at verið AFS-pápi, í mun til at vera ein vanligur pápi, nú tú hevur roynt bæði?

– Tað havi eg ikki hugsað nógv um. Tær komu inn í okkara heim, og tað tyktist skjótt, sum um tær altíð høvdu verið har. Eg havi verið á sama hátt mótvegis AFS-børnunum sum mínum egnu børnum. Eg eri sera góður við tær , ja, og havi sagt tvey par orð, tá eg havi hildið tað verið neyðugt, ja. Møguliga ikki so ofta við tær, sum okkara egnu børn. At húsið hevur verið fult av konufólki er ikki annað enn eg altíð havi verið vanur við her. Tó, so hevur tað verið sera læruríkt og áhugavert við okkara altjóða íkasti í familju okkara«, sigur Palli Mortensen, AFS-faðir.



vinkonur í skúlanum og avgjørdi at eg skuldi læra málið. Eg var so forvitin eftir at vita, hvat fólk tosaðu um, eisini tá fólk skemtaðu vildi eg vera við. Brádliga komu fleiri orð og longu í heystfrítíðini dugdi eg málið.

Skúlin í Føroyum er nógv fríari enn í Sveis, har hann er authoriterur. Eg var sera hugtikin av, at studentarnir í Føroyum dugdu at tosa t.d. franskt eftir 1 ár við fronskum, meðan vit høvdu havt franskt í 5 ár og dugdu ikki málið. Tað eru nógv hægri krøv til stílar og annað í Føroyum enn í Sveis, har størsti dentur verður lagdur á uttanatlæru, og ikki at man veruliga skilir tingini.

Tað var tað besta, sum kundi henda fyri meg at koma til Føroyar og at koma til familjuna hjá Elisabeth og Palla. Í Sveis havi eg ein stórabeiggja og stórasystur. Her í Føroyum fekk eg 3 lítla systrar, og tað var stuttligt.

Tað var ringt at koma heimaftur í fyrstuni, ringt at samskipa báðar verðirnar, tí eg eri so góð við báðar. Eg føldi tað, sum um hjartað var sundurskilt millum lívið og familjuna í Føroyum og lívið og familjuna í Sveis. Nú tá mín familja í Sveis og familjan í Føroyum hava vitjað hvørja aðra og hava fingið betri innlit í alla mína verð, er tað sum mítt sundurskilta hjarta veksur saman og verður heilt aftur.

Í løtuni arbeiði eg á einum heimi fyri brekað. Eg havi ein dreym um at verða lærarinna fyri børnum og í frítíðini at myndprýða til barnabøkur. Eg komi heilt vist altíð at hava samband við familju mína í Føroyum, tað er so deiligt at koma heimaftur.

### Samrøða við Mahmoodu Syed úr Chicago í Illinois í USA sum er 26 ára gomul og búði í Føroyum fyri 11 árum síðani, sum AFS-ari.

– Eg valdi at koma til Danmarkar, so fekk eg seinni at vita, at eg kom til Føroyar. Vitanin eg hevði um Føroyar, áðrenn eg kom, var gjøgnum vertsfamilju mína, ið sendi myndir og greiddi frá, hvussu familjan var.

Fyrstu ferð vit komu hagar, vóru vit skelkað, tí at tá vit høvdu hoyrt, at Føroyar vóru oyggjar, trúðu vit at har var heitt, sól og strendur. Men tá vit komu úr flogfarinum við sólbrillum og alt klárt til góða veðrið, tá var myrkt, regn og kalt, tað var av sonnum skelkandi.

At koma til familjuna í Føroyum var lætt, tí øll vóru øgiliga vinarlig. Tey líktust mínari familju, tí tey vóru so sera tolin, t.d. tá eg lærdi meg málið. Móðurmálið er urdu, annað málið enskt, umframt hesi dugi eg spanskt, teknmál og nú føroyskt. Men tá eg kom til Føroyar, visti eg ikki at tað kundi vera ljóst úti so leingi, so eg sovnaði og vaknaði, og tað var alla tíðina ljóst, so tað var ørkymlandi.



- Studentaskúlin var heilt annarleiðis enn skúlarnar í USA. Skúlastjórin í Hoydølum var vinarligur og tosaði við næmingarnar. Tað ger ongin skúlastjóri í USA, teir eru ikki vinarligir, men authoriterir.

Eg eri muslimur eins og øll familja mín úr Pakistan, so tað var fyrstu ferð, eg var í eini kirkju, tá eg var í Føroyum. Kirkjan á Tvøroyri er sera vøkur og tað var vakurt at hoyra sang í kirkjuni, tí vit syngja ikki í moskuni. Tað var gott at vera í kirkjuni, tí tað var andaligt, hóast eg ikki eri kristin.

- Enn í dag, trúgva fólk mær ikki í USA, tá eg sigi frá um mín túr til sjós í Føroyum. Fyrstu ferð var eg við Ólavi Hvíta, og seinni var eg við abba mínum, Leivi Holm, sála, við Rasmus Effersøe. Tað var stuttligt. Eg dámdi allar best at vera á Tvøroyri, tá eg var í Føroyum. Abbin og omman Judith, mammubeiggin og abbabeiggin vóru øll so góð við meg.

Fyri tveimum árum síðani, tá eg var til samrøðu fyri at koma inn á Lærda Háskúlan at lesa til lækna, tá tosaði eg nógv um mínar lívsroyndir í Føroyum. Tey, ið hoyrdu meg umrøða Føroyar vóru rættiliga hugtikin av at hoyra um hetta ókenda unika landið.Eg lesi annað árið til lækna nú. Eg fari at kanna, hvussu tað er at arbeiða sum lækni í Føroyum, so um mær dámar tað, komi eg møguliga at vera lækni her eina tíð. Eg eri gift og maður mín arbeiðir eisini innan heilsuverkið. Árið í Føroyum hevur gjørt meg meira opna og ævintýrhugaða.

Hetta er triðju ferð eg vitji aftur, síðani eg fór í 1997, og familjan í Føroyum vitjaði meg í 2001. Árið í Føroyum og alt eg upplivdi har hevur skapt meg til tað menniskja, eg eri í dag.